


# Umboðsmaðurin nýggja heimasíðu

Í eina tíð hevur verið greitt, at heimasíðan hjá Løgtingsins umboðsmanni, sum verður nýtt til at kunna um virksemi hjá umboðsmanninum, hevði tørv á dagføringum. Í hesum sambandi hevur umboðsmaðurin valt at gera nakrar innihaldsligar broytingar og geva heimasíðuni eitt nýtt snið.

Stórar tøkniligar broytingar eru hendar síðani fyrsti Løgtingsins umboðsmaður byrjaði sítt virksemi í 2001. Møguleikarnir at samskifta talgilt eins og atkoma til samskiftistøkni eru nógv broytt.

Hjá Løgtingsins umboðsmanni merkist hetta eitt nú á tann hátt, at nærum alt samskifti frá borgarum og myndugleikum er vorðið talgilt.




Nýggja síðan er gjørd við tí í huga, at tey sum venda sær til umboðsmannin yvirskipað kunnu býtast í tríggjar bólkar:

- tey, ið ynskja at klaga
- tey, ið ynskja at leita sær kunning og vitan
- børn, ella vaksin vegna børn, sum ynskja at klaga ella leita sær kunning

Mitt á høvuðssíðuni eru tí nú tríggjar høvuðsinngongdir til síðuna:

- Klaga
- Leita í savninum
- Barnanna umboðsmaður

Hesar høvuðsinngongdir eru ætlaðar at gera tað lættari hjá vitjandi á síðuni at finna tað tey leita eftir.

Innihaldið á nýggju síðuni er bólkað eitt sindur annarleiðis, men er annars nærum tað sama, sum á síðuni frá 2010.



Heimasíðan hevur eins og higartil teldutalu, soleiðis at blind, sjón- og lesiveik hava møguleika at hoyra niðurstøðurnar hjá umboðsmanninum á telduni.

Áhugað kunnu senda sína klagu beinleiðis til umboðsmannin gjøgnum heimasíðuna. Eisini liggja klaguvegleiðing og oyðibløð til fulltrú, um so er at onkur ynskir at lata seg umboða av øðrum.

Størsta broytingin við síðuni er, at allar almennar niðurstøður, kanningar, eftirlitsvitjanir, greinar og ársfrágreiðingar eru lagdar í eitt savn, har tilfarið er flokkað eftir málsøki, evni og árstali. Eisini ber til at leita í savninum við fríteksti.

Umboðsmaðurin vónar við hesum savni at gera tað lættari og meira atkomuligt hjá eitt nú lesandi, starvsfólki innan fyrisitingina og øðrum áhugaðum at finna ta vitan, tey sóknast eftir.




Skjølini í savninum eru flokkað á tann hátt, at leiting eftir einum ávísum evni vísir skjøl, har evnið antin verður nevnt ella verður viðgjørt.

Síðan um virksemið á barnaøkinum er broytt og hevur fingið sama snið, sum heimasíðan hjá umboðsmanninum. Innihaldið er sum heild tað sama, sum á fyrru síðuni. Barnasíðan hevur eitt serligt oyðiblað til klagur frá børnum.

Heimasíðurnar eru at finna á ávikavist [www.lum.fo](http://www.lum.fo) og [www.bum.fo](http://www.bum.fo)

Umboðsmaðurin vónar, at nýggja heimasíðan verður nyttulig fyri borgarar, myndugleikar, lesandi og onnur.

